# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



Tórshavnar alfrøði:

## Havnar Sangfelag í 1961

Hendan myndin av tikin í Kommunuskúlauluni í Havn av Havnar Sangfelag í 1961, í samband við at S.H. Jacobsens Radiohandil gav út tvær EP-plátur við føroyskum sangum. Vit kenna nøvnini á fleiri av persónum, men ikki á øllum.

Havnar Sangfelag var stovnað 25. juli 1925 og byrjaði sítt virksemi í oktober mánað sama ár. Stovnarar vóru: Jógvan Waagstein, Herluf Lützen, Johan Mikkelsen, Edvard Mitens, Helena Kragesteen, Magnhild Simonsen og Sofía Petersen.

Orsøkin til at felagið varð stovnað, var at eitt danskt studentafelag sum skuldi koma á sangferð, vildi helst hava eitt sangfelag at koma til. Samb. Dimmalætting búðu bert 2665 fólk í Havn í 1925. Tá hevur ikki verið so nógv fólk at taka av. Møguliga var hetta fyrsta sangkór í Havn.

Um onkur liggur inni við myndum av Havnar Sangfelag frá 1925 ella har á leið, hevði tær myndirnar verið kærkomnar til Havnarsøguna, sigur Birgar Johannessen, sum heitir á fólk sum kenna persónar á hesi myndini um at ringja til sín á tel. 214647 ella 314647.



**HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ**
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

### *Ein ætlað røða til 50 ára dagin hjá Tobba løgtingsmanni*

*Eg skal ikki halda nakra langa røðu*
*ei heldur nakra søgu.*
*Bert eina lítla kvøðu.*
*Til fimmti ára barnið, sum hvørki er av jarni*
*ella bummulsgarni.*

*Okkara stóra og góða skald*
*Janus Djurhuus, yrkir einastaðni:*
*Kanska um hundrað ár,*
*fellur ein ungmoy tár.*

*Vit kunnu kanska loyva okkum at*
*broyta hetta til Tobbasa fyrimun:*

*Kanska um hundrað ár, upprennur okkara*
*fullveldisvár og burtur er øll sambandsfár.*

*Torbjørn! Vøgga tín stóð í Ærøskøbing*
*stutt frá Marstal og tó bleiv tú*
*skrivaður í føroyskt mantal.*
*Fyri mær hevur tú altíð staðið*
*sum ein ordans kal, ja devilin gal.*

*Hjartaliga tillukku við tínum stóra degi.*

*Vit vóna at tú mást liva*
*minst fimmti ár víðari,*
*nú føroyar gerast meira fríari.*

Dia Ellindsson
Runavík